# Trolari fekk einki boð upp á fiskin

**- Sambært fiskapakkanum, kunnu vit í mesta lagi landa 25% av veiðini í hvørjum fjórðingsári uttanlands, men nú eru vit noyddir at fara av landinum við fiskinum, tí eingin keypari er í Føroyum, sigur Bjarti Mohr, reiðari**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Vit hava prógv fyri, at vit hava bjóðað fiskin út á uppboðssøluni hjá Fiskamarknaði Føroya, men eingin keypari er. Vit hava eisini ringt til fiskavirkir og spurt, um tey vilja keypa fiskin, men eingin vil keypa. Tí noyðast vit ímóti okkara vilja uttanlands við lastini. Hetta merkir, at vit missa ein heilan túr, nú vit noyðast av landinum við fiskinum.

Hetta sigur Bjarti Mohr, sum eigur trolaran, Vesturvarða.

Hósdagin hevði Vesturvarði 1000 kassar inni, og ætlanin var at fiska til í morgin, leygardagin.

- Vit hava bjóðað fiskin út alment – og eisini privat, men hava einki boð fingið, sigur reiðarin.

Hann vísir á, at sambært fiskapakkanum, kunnu føroysk ísfiskaskip í mesta lagi landa 25% av veiðini í hvørjum fjórðingsári uttanlands.

- Men nú eru vit noyddir at fara av landinum við fiskinum, tí eingin keypari er í Føroyum, sigur Bjarti.

### Saltfiskur

Hann heldur, at ein orsøk til støðuna er, at nógvur fiskur er at fáa, og at virkir salta nógvan fisk. Haraftrat kemur, at upsin er vorðin frægari til støddar, og tí er betur egnaður at salta.

- Saltfiskurin krevur nógv pláss, og hann bindir nógvan pening, vísir Bjarti Mohr á.

Hann heldur tað vera keðiligt, at skip og manning skulu noyðast av landinum við fiskinum, nú tað stundar til jólahøgtíðina.

- Sluppu vit av við fiskin í Føroyum, kundu vit gjørt ein túr aftrat til jólar, men tað verður ikki, nú vit antin noyðast niður til Scrabster ella til Hanstholm, sigur Bjarti Mohr, reiðari.



*Bjarti Mohr, reiðari, harmast um, at ikki slepst av við fiskin hjá Vesturvarða Føroyum í løtuni*

Mynd: Vilmund Jacobsen

# Fjarstýrdir kavbátar skulu máta sjógvin

**Amerikanski granskingargrunnurin, National Science Foundation (NSF), hevur játtað pening til eina trý-ára samstarvs verkætlan millum Fiskirannsóknarstovuna og University of Washington í Seattle, USA**

MÁTINGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




Orsøkin til amerikanska áhugan er, at rákið kring Føroyar hevur stóran týdning fyri tað sonevnda termohalina rákið (havsins kalda hjarta), og møguligar broytingar í hesum ráki kunnu føra við sær veðurlagsbroytingar, bæði kring Norðurlond og um allan heim.

Fiskirannsóknarstovan sigur á síni heimasíðu, at endamálið við nýggju verkætlanini er at gera havrannsóknir av hesum týdningarmikla ráki við trimum smáum fjarstýrdum kavbátum ella sonevndum Seagliders (hav-svívarum).

- Tveir svívarar skulu ”svimja” aftur og fram millum Føroyar og Ísland, og ein skal ”svimja” millum Føroyar og Hetland.

Svívararnir verða stýrdir og senda mátingar av hita, saltinnihaldi, streymferð, mongd av plantuæti og øðrum um fylgisvein. Teir kava niður á 1000 metra dýpi ella niður móti botni, har tað er grynri enn 1000 metrar.

Ein hav-svívari kavar og sendir mátingarnar um fylgisvein. Hetta er ein tøknilig nýmenning, sum væntandi fer at fáa ógvuliga stóran týdning í komandi tíðum.

- Hav-svívarar fara nevniliga at minka um tørvin á dýrum rannsóknarskipum. Ein hav-svívari kann soleiðis sjálvur ”svimja” hagar, hann skal máta. Hvørja ferð, hann er við vatnskorpuna, sendir hann tær seinastu mátingarnar og fær boð um, hvagar hann nú skal fara, sigur Fiskirannsóknarstovan.

Ein hav-svívari er 1, 8 metrar langur, vigar um 50 kilo, hevur tveir veingir og eitt vel. Við eini elektriskari pumpu verður olja pumpað í og latin úr einum bjølgi, og svívarin broytir sína rúmd hóast vektin er tann sama.

- Hetta broytir um uppdriftina, og er at samanbera við sundmagan í einum fiski. Tá svívarin skal kava, verður olja latin úr bjølginum, svívarin gerst tyngri enn sjógvur og byrjar at søkka. Men skapið og veingirnir gera, at svívarin ikki bara søkkur, men at hann eisini ferðast frameftir – á sama hátt sum ein svívflúgvari, sigur Fiskirannsóknarstovan.

Lagt verður aftrat, at niðri við botn verður olja latin í bjølgin, svívarin gerst lættari enn sjógvur og byrjar at svíva móti vatnskorpuni aftur. Hesin háttur at flyta seg uppá krevur sera lítla orku, og svívarin kann tí vera í sjónum meira enn eitt hálvt ár hvørja ferð.


## Barnsburðaravloysari til Telebúðina á Tvøroyri

"Eingin framtíð er í starvinum, framtíðin er í starvsfólkinum"

George Crane



**Søkt verður eftir barnsburðaravloysara til Telebúðina á Tvøroyri at byrja sum skjótast.**

Telebúðin á Tvøroyri er ein av sjey Telebúðum kring landið. Telebúðirnar hava ment seg munandi seinastu árini og ætlanirnar fyri framtíðina eru stórar. Til handilin á Tvøroyri søkja vit eftir einum avloysara, sum skal luttaka í øllum uppgávum, ið skulu til fyri at fáa eina góða tænastu. Til rætta fólkið hava vit eitt sera spennandi starv.

**Til starvið ynskja vit eitt fólk við:**

· førleika innan allan vanligan handils skap, t.d. at gera kassauppgerðir, vøru teljingar og nýta kassatól
· handilsroyndum og royndum at avgreiða kundar
· royndum at selja fjarskiftisútgerð ella aðra tøkni og teldur
· førleika at seta seg inn í nýggja tøkni
· evnum at samstarva við nógvar ymiskar starvsfólkabólkar
· ídni at røkka ásettum málum
· kunnleika til enskt
· vilja at hjálpa, har tað er neyðugt
· evnum at arbeiða og avgreiða mál skjótt
· viðkomandi útbúgving

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið galdandi fyri Føroya Tele.

Telebúðin á Tvøroyri er opin allar vanligar handilstíðir og arbeitt verður í skiftum við hini starvsfólkini í handlinum.

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til Niels Hammer, tel 303489 ella Starvsfólkadeildina á tel 303030.

Umsóknir skulu verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 30. desember og skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Box 27
110 Tórshavn

**FT Samskifti er dótturfelag í Føroya Tele. Í nýggja felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-økið og øll støðarúgerð fyri fastnetstelefoni og breiðband. Broytingin til nýggja dótturfelagið er við til at tryggja eins treytir fyri kappingarneytarnar á marknaðinum. Hesir nýggju karmarnir geva nýggjar møguleikar at veita betri og bíligari tænastur til kundarnar. Í felagnum starvast 105 fólk. Tænastur fra FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*